



*Vil Miðflokkurin hava annan Landsstýrissess?*

gera, at hóast flokkarnir hava framsøgufólk á málsøkjum, eru tað sera breið økir til hvønn einstaka politikara. Tí hava okkara politikkarar sera nógv mál at seta seg inn í og taka støðu til og tørv á betri arbeiðsumstøðum.

Okkara løgtingslimir hava í dag ikki egna skrivstovu og heldur ikki sína egnu teldu í Løgtinginum.

**Hví egnan skrivara?**

At geva løgtingslimunum skrivara, er ein háttur at styrkja tað parlamentariska arbeiðið. Tað ger, at tann einstaki løgtingslimurin hevur betri umstøður at fáa mál kannað og at gera tinguppskot. Ein slík skipan elvir til, at flokkarnir sjálvir fáa eina umsiting, sum ger, at teir hava nógv betri fortreytir fyri at koma við heildaruppskotum og mót- og broytingaruppskotum til tað, sum kemur frá landsstýrinum. Hetta styrkir sjálvt flokksapparatið og ger at tað er nógv størri fyrimunur í samstarvi, tí at flokkarnir gerast ein sterkari eind. At gera ein slíkan leist setir upp grundleggjandi karmarnar fyri einari politiskari skipan, sum arbeiðir við langtíðarsemjum.

Krøvini fyri at fáa eina dynamiska minnilutastjórn er, at andstøðan kann spæla við. Skal hon tað, er grundleggjandi neyðugt at geva løgtingslimunum betri arbeiðsumstøður, s um nevnt omanfyri. Teir karmarnar hevur løgtingið ikki og tí er lítið sannlíkt at okkara skipan ber eina minnilutastjórn uttan ein fastan stuðulsflokk.

**Og nú?**

Tað mest sannlíka er, at Sjálvstýrisflokkurin verður tikin inn í samstarvi. Hetta verður antin sum, stuðulsflokkur við at tryggja sær ávirkan á ávís mál og onkran góðan nevndarsess ella sum beinleiðis partur av samgonguni. Sjálvstýrisflokkurin hevur greitt sagt, at hann vil hava ávirkan. Men tað tykist eisini greitt, at flokkurin fer ikki at tengja seg at CHE samgonguni fyri ein hvønn prís. Roknast má eisini við, at flokkurin fer at trýsta hart á fyri at fáa ein landsstýrissess. Hesum hevur Miðflokkurin víst aftur, men hinvegin eisini sagt, at Almanna- og heilsumál skulu býtast í tvey.

Gerst Sjálvstýrisflokkurin stuðulsflokkur fær samgongan arbeiðsfrið og bæði løgmaður og Høgni Hoydal søgdu í gjár, at tað er neyðugt. Brennandi spurningurin í dag er, hvat kostar stuðulin frá Sjálvstýrisflokkinum og vil samgongan gjalda hann?

**Nýtt Landstýri**

CHE samgongan hevur í veruleikanum einki val. Javnarðarflokkurin vil ikki sleppa løgmanssessinum og Tjóðveldi vil ikki sleppa Uttanríkisráðnum. Skal Sjálvstýrið við í samgonguna, krevur tað broytingar í landsstýrinum. Her hevur Miðflokkurin gjørt fyrsta leikin við at krevja Almanna- og heilumálaráðið býtt í tvey. Miðflokkurin situr á figgjarmálum, tað er ein ógvuliga týðandi ráðharrasessur. Men Miðflokkurin er ein sonevndur kensluflokkur og við niðurgangstíðum fyri framman, er væl møguligt, at hann vil sleppa sær av við figgjarmál og heldur fáa fatur á almannamálum, sum er eitt av kjarnumálsøkjunum hjá flokkinum. Har kann hann berjast fyri betri sømdir hjá teimum sum hava tørv, í staðin fyri at hava ábyrgdina fyri at skerja almennu útreiðslurnar.



*Við Gerhard fór meirilutin, men hann er neyvan meira samdur við andstøðuni*